## DAGSINS MEINING

# Vøtnini skiljast

Vøtnini millum samgongu og andstøðu eru um at skiljast. Í byrjanin var alt at kalla idyllur, og andstøðan fekk eitt uppskot fyri og annað eftir samtykt á tingi við atkvøðunum hjá samgonguni. Andstøðan setti politisku dagsskránna og fekk til hetta góða hjálp frá vælmeinandi tingmonnum úr samgonguni, sum av einum erligum hjarta royndu eftir tí breiðu semjuni. Tað sá eisini út sum, at tað skuldi verða andstøðan, sum avgjørdi, hvussu fíggjarlógin skal síggja út. Tá álitið frá fíggjarnevndini kom fyri dagsins ljós, vísti tað seg, at andstøðan hevði sett so nógv og so greflig fingramerki á uppskotið, at tað gjørdist landsstýrismonnum samgongunnar ovboðið. Tá fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin so omaná alt fór í sjónvarpið og segði uppskotið vera sítt uppskot, fleyt bikarið yvir.

Málið fór aftur í fíggjarnevndina, og endin gjørdist, at uppskotið hjá samgonguni varð samtykt við nøkrum av hjartamálum andstøðurnar. Nú er so vent í holuni, og andstøðan er farin í frontalálop á samgonguna. Tað kunnu vera fleiri orsøkir til hetta. Ein orsøkin kann vera tann heilt einfalda, at teir hundrað dagarnir nú eru lidnir. Hetta plagar vanliga at merkja, at friðingartíðin hjá einum landsstýri er av. Hetta kann eisini stava frá frustratiónum av, at tað ikki eydnaðist at taka samgonguna av ræði í fíggjarnevnindi. Ella, at tað við øðrum orðum er vorðið greitt, at tann sera framfýsni semjusøkjandi politikkurin hjá andstøðuni nú er miseydnaður.

Andstøðan sær nú vandan fyri at verða sett heilt út í myrkrið av eini samongu, sum hevur ein so stóran meiriluta aftan fyri seg, at henni ikki nýtist at samstarva. Tað er her vit helst skulu finna orsøkina til at samgongan knappliga finnur seg sjálva undir álopi, tað verið seg av stórmálum sum ES og NATO ella av einum hvørjum tíðindaskrivi, sum verður lagt út sum, at landsstýrismenn ella løgmaður ynskja at blaka torvmold í eyguni á fólki. Hetta er eitt krepputekin hjá andstøðuni, og tí eigur hon at ansa sær, at hon ikki loypir heilt framav. Landsstýrið eigur eisini at ansa eftir, at tað ikki einvíst nýtir sín stóra meiriluta móti andstøðuni. Tann breiða semjan er altíð sterkasta loysnin, um tað væl at merkja er sitandi samgonga sum setir politisku dagsskránna.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Pengar hava onga endastøð

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



"Drop bloktilskudet til Færøerne" var boðskapurin, sum Hermann Oskarsson, formaður í búskaparráðnum hevði at bera dønum í tíðindasendingini hjá Danmarks Radio týsmorgunin í hesi vikuni. Tíðindakvinnan endurgav formannin í búskaparráðnum fyri at siga, at "det er 1 mia. kroner direkte ud af danske skatteyders lommer og er bare til besvær for Færøerne, som de sidste ti år har sendt pengerne videre til udlandet".

At fáa slík boð frá "formanden for Færøernes økonomiske råd", má vera skelkandi fyri danskar skattgjaldarar og politikarar, tí tá sagt verður, at pengarnir verða sendir víðari til útlond, so kann tað skiljast sum um at føroyingar ikki hava brúk fyri pengunum sjálvir, og tí geva teir burtur til onnur at brúka. Men soleiðis er veruleikin sjálvsagt ikki. Føroyingar hava brúk fyri blokkstuðlinum, um vit skulu varðveita tær tænastur, sum føroyska samfelagið hevur at bjóða sínum borgarum.

**Eingin endastøð**
Pengar hava tann løgna eginleika, at teir enda ongastaðni, men eru alla tíðina í umferð. Tað at vit arbeiða og fáa løn útgoldna, er í sær sjálvum ikki tað sum gevur okkum mat í munnin, men tað at vit keypa matvørður fyri pengarnar (tað vil siga lata pengarnar frá okkum aftur), ger at vit kunnu eta okkum mett.

Hetta er eisini galdandi fyri bæði blokkstuðulin og aðrar pengar, sum koma inn í føroyska samfelagið. Pengar sum vit vinna fyri útflutningsvørur verða eisini "sendir av landinum" aftur, men tað merkir ikki, at teir eru óneyðugir ella "bare til besvær for Færøerne", sum Hermann Oskarsson sigur um blokkstuðulin. Vit fáa bæði vørur og tænastur fyri pengarnar, tá vit gjalda við teimum.

**Búskaparráðið**
Uppgávan hjá búskaparráðnum er at ráðgeva um búskaparlig viðurskifti og tí er tað umráðandi, at úttalilsini frá ráðnum hava somikið við veruleikan at gera, at tey sum skulu hava ráðgevingina megna at fylgja við.

Sambandsflokkurin átekur sær ongan rætt til at ávirka búskaparráðið politiskt, men flokkurin stendur spyrjandi yvirfyri hesum úttalilsinum, og vil tí spyrja, um búskaparráðið og tess limir veruliga halda, at ein milliard, sum ikki verður brúkt, kemur inn í føroyska samfelagið, og at vit onga nyttu fáa burturúr hesi milliardini áðrenn hon fer av landinum aftur?

# Stórsigur til minnilutan

**Jógvan Arge**
*býráðslimur*



Eitt kærumál hjá minnilutanum í Tórshavnar Býráð er endað við, at kommunala eftirlitið hevur skorið út í papp, at tað er kommunustýrið sjálvt, sum er játtanarmyndugleiki í peningamálum, og hesin myndugleika kann ikki latast eini býráðsnevnd.

Minnilutin varnaðist fyri einum góðum ári síðani, at býráðsmeirilutin var farin undir eina nýggja mannagongd, sum hevði við sær, at býráðið sjálvt ikki fekk høvi til at taka støðu til stórar byggiætlanir av barnagørðum, skúlum og øðrum bygningum.

Málini vórðu viðgjørd og avgreidd í avvarðandi nevndum og komu ikki fyri býráðið. Samstundis varð ein roynd gjørd at gera eina mannagongd, sum als ikki hevði sjálvt býráðið inni í málsviðgerðini, men bert umsitingina og sernevndirnar.

Hetta hildu vit í minnilutanum vera heilt burturvið, og av tí, at meirilutin forðaði okkum beinleiðis at fáa hesi málini avgjørd í sjálvum býráðnum, vendu vit okkum til kommunala eftirlitið við fyrispurningi um, hvussu kommunulógin skuldi skiljast.

Har stendur klárt og greitt, at kommunustýrið er játtanarmyndugleiki - og ongin annar - og hetta hevur kommunala eftirlitið nú útgreinað í einum svari á kæru okkara.

Kommunala eftirlitið skrivar m.a.: "at einstøku íløgurnar í barnagarðar, vøggustovur og aðrar stovnar skulu viðgerast og samtykkjast av býráðnum, tá fíggjarætlanin ikki hevur tikið støðu til ítøkiligu íløgurnar ella ikki nóg neyvt hevur tikið støðu til hesar.

Ein nevnd kann sostatt ikki játta pening ella seta arbeiðir í verk, sum kommunustýrið ikki staðiliga hevur játtað pening til - annaðhvørt á sjálvari fíggjarætlanini ella seinni. Tílík mál, sum verða viðgjørd í nevndunum, skulu sostatt leggjast fyri kommunustýrið til avgerðar".

Í próvførslu okkara løgdu vit eisini dent á, at komu slík mál ikki fyri sjálvt býráðið á almennum fundum, so høvdu borgarnir als ongar møguleikar at vita, hvat fór fram í býráðnum á hesum økjum, tí nevndarfundirnir eru fyri læstum hurðum. Her vóru sostatt hvørki opinleiki ella gjøgnumskygni.

Somuleiðis løgdu vit dent á, at tað kundi ikki vera rætt, at meir enn helvtin av býráðnum kundi haldast uttanfyri so týðandi avgerðir, sum hesar. Býráðsnevndirnar hava sum kunnugt fimm limir av teimum trettan býráðslimunum.

Nú hava vit so fingið hetta upp á pláss og ætla at halda okkara kós fram móti opinleika og gjøgnumskygni til frama fyri øll í Tórshavnar Kommunu.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Fjákut og fundamentalistiskt vekilsismøti á Christiansborg

**Virgar T. Dalsgaard**



Nú harra Høgni Hoydal er komin niður aftur á danska Fólkatingið, hevur hann á vanliga narcissistiskan hátt saman við teimum báðum grønlendsku fólkatingskollegunum kallað saman eitt valalið av dønum, sum hann á knortlutan hátt og við vanliga bombastiskum orðalagi vil hava at hjálpa sær móti føroyingum og føroyska landsstýrinum. Naivir danir skulu heilavaskast til loysingarmenn av útnyrðingsmonnum! Henda fjákuta norðuratlantiska alliancan millum føroyingar og grønlendingar er bæði vanærislig og hartil ein eyðmýkjandi stór skomm!

Tá ið Hoydal ikki fær sín vilja við føroysku veljarunum, ja so krýpir hann heilt eftir tí gomlu loysingarreceptini beint undir danska skjúrtufaldin og skal bidda sær stórdanska hjálp til at trumfa síni sjónarmið ígjøgnum. T.d. hevði hann boðið sjálvum stjóranum fyri Danska Nationalbankanum (sic) at skifta orð um framtíð Føroya. Hvat hugsar ein slíkur maður fyri sær? Er debattin um føroyska parlamentarismu nú flutt inn í danskan valutapolitikk? Við allari respekt fyri frú Bodil Nyboe Andersen, – men hvat í allari víðu verð veit hon um føroyskan politikk, og við hvørjum mandati skal tann neyðars kvinnan úttala seg? Hví skal henda sakleysa kvinna gerast gísli og kastibløka millum Hoydal og føroysku mótstøðumenn hansara?

Men ikki nóg mikið við hesum danska kransakøkufiguri, nei, nei hann hevði harafturat sjálvandi boðið einum íslendskum professara sum talara – hetta tykist at vera fastur siður hjá fullveldisprofetum – men álvaratos, hvat rakar føroyskur politikkkur íslendingar? – Lat teir fáa skil í egnum húsi, og lat teir royna at berja seg burtur úr síni fíggjarligu armóð – »fyrimyndarlandið«, sum hevur lægstu lønir í øllum Norðureuropa, og annars livir av mannminkandi amerikanskum blokkstuðuli fyri eina ivingasama militerstøð!

Tað er ein landaskomm, at harra H.H. absolutt vil blanda grønlendskan og føroyskan politikk saman – vit hava snøgt sagt einki til felags, – præmissurnar eru fundamentalt ólíkar, men tað hevur eydnast harra Hoydali upp á minni enn seks ár at billa summum dønum inn, at grønlendingar og føroyingar eru »eitt feitt«!

Endiliga hevði H.H. boðið tí permanenta harra Hermanni Oskarssyni, okkara »leiðandi« hagdrongi vid. Hesin sjáldsami »økonomur« kom við sínum vanligu ábyrgdarleysu úttalilsum um blokkin, úttalilsir, sum vísa, at maðurin antin ikki respekterar ella dugir ta lítlu tabellina. Hann loypir lætt og elegant um alla multiplikatoreffekt og setir paritetiskt virði millum blokkpening og føroysku fíggjarlógina. Tá er hann ikki meira seriøsur enn tann láturligi tjóðveldisøkonomurin, harra Jóannes Eliassen, sum ferðaðist sum trúboðari hjá H. H. við Hvítu Bók um alt landið á sinni. Sum økonomur er Oskarssonurin púra óseriøsur, og kann ongantíð takast fyri fult – ikki bara eftir henda fundin, men eisini fyri sín politiserandi facon, síðan hann gjørdist leiðari av polit-bureau (búskaparráðnum)! Ófatuligt, at ein tílíkur maður kann sita í embætisstarvi og møsna og dumma seg ferð eftir ferð, antin hann so er albanskur statskapitalistur ella karráur og ultraliberalur Friedmanns-apostul!

Men vit leggja til merkis, at eingin – heldur ikki fíggjarministarin Bárður Nielsen – var boðin frá føroyska landsstýrinum – hetta er avbera forvitnisligt. Hvør gevur harra H.H. mandat til at skipa fyri religiøsum vekilsismøti um loysing, uttan at nakað beinleiðis umboð er fyri føroysku stjórnina?

**Grammur danskur gulldrongur**
Harra Høgni Hoydal fær 116.000 kr um mánaðin – hetta er ein av dýrastu politisku dreingjum okkara, og við slíkari inntøku, heldur hann kanska, at hann noyðist at markera seg, so fólk halda, at hann ger okkurt lítið fyri lønina! Tí so mikið kunnu vit, ið hvussu so er, øll semjast um, at hesa astronomisku lønina er hann als ikki verdur, ikki í nær ella námindu!.

Vit duga væl at síggja, at tað er møtimikið hjá manninum at vála desperatur í politisku oyðimørkini men tó er hann við danska loysingarfundinum vassaður ov langt út í illoyalan absurditet. Tað tilkemur ikki føroyskum fókatingsmonnum at tjakast um politisku framtíð Føroya, hvørki við frelstar danir, íslendingar ella grønlendingar – tað hava hvørki Oskarssonur ella Hoydalur moralskt mandat til, nei, tað skulu føroyingar gera sjálvir heima í Føroyum!

Lítið borðbært er, at ein maður, sum vinnur meira um mánaðin, enn ein føroysk fiskavirkiskona ger upp á eitt hálvt ár, skal troysta sær at tosa við útlendingar um loysing og fullveldi, sum fyrst og fremst vil skerja føroysku lág-inntøkurnar uppaftur meira! Men harra H.H. og hansara akademisku líkar verða valla skerdir í fyrstu atløgu! Hesum áttu føroysku politiserandi trúboðararnir at upplýst sínum íslendsku, grønlendsku og stórdonsku vinum eitt sindur um! Loysingarrørslan hevur altíð dult sum mansmorð, hvussu fullveldið fer at skerja korini hjá teimum ringast støddu! Fullveldismissionerar, hagdreingir og aðrir playboys fáa nokk onga neyð – slíkir flóta altíð omaná!

Vit vóna, at Føroya landsstýri gevur harra Høgna og hinum norðuratlantisku frellunum ein hóskandi og væl uppibornan »lúsing« og eina sera hvassa átalu fyri at vága sær at flyta føroyskan innanlendispolitikk niður á politiskt-religiøsan stórdanskan vekilsisfund á Christiansborg.

Kann Høgni Hoydal ikki markera seg á annan og meira civiliseraðan hátt, er tað nógv betri, at hann heldur fram at snorksova ella bara njóta tað frálíka vakra danska landslagið og tað undurfagra og lýggja várveðrið, sum beint nú er komið! Tað áttu nú eins og fyrr at verið góð líkindi fyri eina »imperialistiskt plágaða tjóðveldishetju« at dusa sær í skemtiliga, spennandi og várkáta býnum Keypmannahavn, tá ið árslønin er umleið 1,4 milliónir krónur av kúgandi donskum gulli, sum verður supplerað við fríari telefon, fríum faksi, fríari teldu, skrivstovuhaldi, skrivara og skattafríum donskum borðfæi!

Sjálvt ikki tann klassiska fríggjadagsbønin hjá fundamentalistunum í tjóðveldisflokkinum hevur nakrantíð verið so fjaðursár, innantóm og endamálsleys sum hetta tápuliga vekilsismøti hjá Høgna Hoydali, sjálvt um hann sjálvur heldur, at hann hevur fingið nakrar deyðlúgvaðar danir umvendar til loysingarmenn. Tey fáu, sum vitnaðu, virkaðu, sum um tey ikki rættuliga vistu, hvørja grammofonplátu, tey skuldu lira av fyri at tekkjast Høgnaliðinum!

Tó eru hópin nógv, ið enn fáliga spyrja – hví varð hetta møtið hjá fundamentalistisku fullveldissektini hildið á danska Fólkatinginum í Danmark og ikki í Mekka, nei orsaka meg í Reykjavík, har teir hava so nógvar reystar íslendskar loysingarvinir? Hví leggja íslendingar ikki bæði gistingarhús og Alting til; hví fíggja hesir fullveldisvinir ikki við tí sterku íslendsku krónuni – hví skulu danir altíð gjalda, tá ið tjóðveldismenn skulu upp at flagsa, reypa og hava dýran gorringarfund?

# Býráðið er ótrúligt!

**Laila av Reyni**
**Barbara Jacobsen**

Fyrst í mars mánaði hoyrdu vit dagrøktarar sum slatur, at stórar broytingar verða á dagrøktarøkinum. Bygnaðurin í dagrøktini skal broytast, vit skulu »splittast at« og knýtast at ymiskum stovnum. Tað frættist eisini, at onkur stovnsleiðari avgjørt ikki var áhugaður í at fáa okkum inn, tí tað var tað als ikki pláss fyri. Vit dagrøktarar tosaðu aftur og fram. Hettar slaturið kundi ikki koma av ongum, men undarligt, at vit ikki eru tiknar við upp á ráð. Hví fundast við stovnsleiðarar, tá tað eru okkara størv talan er um? Hvør kennir dagrøktina betur enn vit, um broytingar skulu gerast? Vit vóru hóast alt positivar: Kanska skipanin, sum nú er, krevur ov nógv av hvørjum einstøkum? – Sum er ynskja vit meira vitjan av økispedagogum enn tær hava tíð til, og kanska sleppa vit endiliga at avspáka (okkara arbeiðsvika er uppá 48 tímar og 45 min.). Vit skuldu á vanligan økisfund 9. mars, so vit væntaðu at frætta meira tá. Rætt var – telefonketan gekk áðrenn fundin: »Tað var umráðandi, at allar møttu, tí vit skuldu hoyra um »Tankar« um broytingar í dagrøktarskipanini«.

Vit komu á fundin og fingu sjokk: Tórshavnar kommuna ætlar at »avvikla« dagrøktina til august. Tað hevði verið ein arbeiðsráðstevna 19.-20. februar fyri stovnsleiðarar (hví vóru vit ikki eisini bjóðaðar við?) við evninum: Størri samanhang millum dagrøkt og stovn. Hettar er tað fyrsta vit dagrøktarar fáa at vita um hesa »ætlaðu« stóru broyting. Vit blivu bólkaðar og vóru bidnar um at koma við viðmerkingum og spurningum til glarðurnar vit høvdu sæð. Tað var nógv tosað í bólkunum, tí summar vóru heilt ørkymlaðar »Hvussu kann hettar lata seg gera? Vita tey ikki, hvussu smábørnini hjá okkum eru nú?« (Á einari glarðu stóð um felags tiltøk sum t.d. útferðir, jólaveitslur og tunnusláttur). Okkara børn eru umleið 1 ára gomul.

Innaftur at spyrja – nú var eingin ivi. Hettar vóru ikki »Tankar«, her skal okkurt álvarsligt gjøgnumførast. Flestu spurningar kundu ikki svarast, tí ein arbeiðsbólkur var settur at arbeiða við málinum, so trivnaðarstjórin (vit ivast í um býráðið veit, hvat trivnaður er, hóast stjóri er á økinum) visti einki konkret. Leiðarin í dagrøktini er ikki við í arbeiðsbólkinum, og tað er eingin ivi um, at hon hevur fingið ógvuliga vánaliga viðferð, tí tað kom fram sum svar uppá onkran spurning, at eingin leiðsla var – altso leiðarin og økispedagogar vóru so at siga uppsøgd á fundinum. Vit fingu at vita, at teir fáu dagrøktarar sum verða eftir, skulu arbeiða út frá stovnunum, og restin eru »tryggjaðar« starv aðrastaðni á barnaansingarøkinum hjá Tórshavnar kommunu. Aftaná fundin hildu vit áfram at tosa um allar broytingarnar. Onkur hevði lítið og einki fingið við, so sjelkað var hon. Vit eru sikrar í, at fakfelagið hjá okkum fór ikki at finna seg í slíkari viðferð! Hvør fær arbeiði hvar? Vit eru allar ósikrar – hvat við lønini? Onkur ætlaði at siga upp aftaná fundin, men sum altíð tekur man »hensyn«. Hvat við børnunum? Hetta er so bundið arbeiði, man sigur ikki upp uttan víðari. Vit høvdu roknað við, at onkur stovnsleiðari fór at úttala seg til bløðini. Er tað pláss fyri okkum á stovnunum? (4 barnavognar afturat). Hvat siga stovnsleiðarar til at »skula« seta dagrøktarar í starv framum onnur??? Vit hava frætt, at vit ikki verða tiknar fram um. Hvussu halda tit at vit føla okkum í løtuni??? Politikkarar – hvat halda tit???

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.